# Hjartabørn hittust á Tvøroyri



Leygardagin hevði felagið Hjartabørn upplýsandi og hugnaligt tiltak á segl-loftinum á Tvøroyri.

Eini 70 fólk ymsastaðni í Suðuroy og norðaneftir vóru komin saman at lurta eftir fyrilestrum um viðføddar hjartasjúkur, hjartasjúkur annars, um reahabilitering, um týdningin av at eta heilsugóðan mat og um týdningin av at røra seg.

Og annars beyðst eisini høvi hjá hjartasjúkum at fáa eitt prát og somuleiðis var tað kærkomið hjá foreldrum at hjartasjúkum børnum at hittast til prát og hugnaliga samveru.

Tað vóru teir báðir hjartalæknarnir, Hans Petur Nielsen og Heðin Thomsen, sum hildu læknafrøðiligar fyrilestrar um ávikavist viðføddar hjartasjúkur og um hjartasjúkur annars.

Fysioterapeuturin á Suðuroyar Sjúkrahúsi, Sára Danielsen, tosaði um rørslu og Kostráðgevarin, Beinta Leo, tosaði um heilsugóðan mat.

Annars greiddu sjúkrarøktarfrøðingarnir Amy Ljósheim og Marjun Thomsen frá um hjarta-rehabiliteringina á Landssjúkrahúsinum.

Sum tað sæst á myndunum, var eisini fimleikur á skránni.

*Seks hjartabørn vóru við á tiltakinum á Tvøroyri og hendan myndin er tikin av teimum á Seglloftinum. Aftara rað frá vinstru eru tey Páll Herman Sveinsson úr Hvalba, Bogi Arnason av Argjum og Jógvan Fríði Tróndarsson úr Havn. Fremra frá vinstru eru tey Jonna Magnussen úr Vági, Bjørk Bruhn av Tvøroyri og Fríði M. Dam úr Havn*









